UPPLIVINGAR ÚR GERANDISDEGNUM
FRÁ 1907 TIL DAGIN Í DAG

# RØDDIRNAR HANDAN FØROYSKAR SØGUR

**Leif Láadal**



... er frásøgufólk á Føroyskum Søgum. Leif Láadal slerdi bæði navn og rødd sína rimmar fasta í tilvitskuni hjá føroyingum í 80unum sum vertur í Poppredaktiónini í Útvarpi Føroya. Seinnu árini hevur Leif Láadal starvast sum bæði blaðfólk á Dimmalætting og Vinnuvitan, umframt at hann hevur starvast á tíðindadeildini hjá Útvarpi Føroya.

– Í sambandi við Føroyskar Søgur, var tað serliga stuttligt fyri meg at arbeiða saman við so professionellum fólkum og í einum tøkniliga so professionellum umhvøvi sum Nordisk Film, sigur Leif Láadal.

**Marita Dalsgaard**



... er kvinnuliga sitatrøddin á Føroyskum Søgum. Marita varð útbúgvin sjónleikari á sjónleikaraskúlan við leikhúsið í Odense í 2000. Síðan hevur hon spælt við í nógvum leikum bæði í Danmark og Føroyum.

– Tað var einastandandi spennandi og forkunnugt at sleppa at brúka móðurmálið til at leggja rødd til ein føroyskan film – tað hendir ikki á hvørjum degi. Talan er eisini um eina super verkætlan, tí tað er av alstórum týdningin at fáa savnað saman og varðveitt tað gamla filmstilfarið, áðrenn tað ferst, hugleiðir Marita Dalsgaard.

**Olaf Heine Johannesen**



... er mannliga sitatrøddin á Føroyskum Søgum. Olaf Johannesen varð útbúgvin sjónleikari á sjónleikaraskúlan við leikhúsið í Odense í 1985. Hann er uttan iva kendasti og mest virdi føroyski sjónleikari nakrantíð og hevur spælt á størstu pallum í Danmark og havt leiklutir í stórum sjónvarpsframleiðslum.

– Eg helt tað verða ómetaliga skeg at síggja tey gomlu filmklippini, ið vísa støð, eg havi hoyrt so nógv um, men ongantíð sjálvur upplivað, eitt nú hvalastøðina við Áir. Tað var sera áhugavert at sleppa at uppliva Føroyar sum stórhvalatjóð við mínum egnum eygum, heldur Olaf Johannesen.

Røddirnar á donsku útgávuni av Føroyskum Søgum eiga:
Gorm Bull Sarning (frásøgufólk)
Pauline Rehné (kvinnu røddin)
Nikolaj Pors (mans røddin)

# FØROYSKAR SØGUR
# UPPLIVINGAR ÚR GERANDISDEGNUM
## FRÁ 1907 TIL DAGIN Í DAG

**Meiri enn 100 minuttir við fangandi frásagnum frá stórum og smáum gerandishendingum í Føroyum seinastu 100 árini. Allar lýstar við einastandandi, søguligum filmsupptøkum, ið eru innsavnaðar frá søvnum og undan væðingini hjá føroyingum. Teir mongu filmarnir eru kryddaðir við endurgevingum frá fólkum, ið vóru hjástødd, og geva harvið eina sermerkta lýsing af gerandisdegnum hjá føroyingum. Hetta umfatandi arbeiði, fyri at varðveita mentanina, hevur einans verið gjørligt við stuðli frá Eik Grunninum.**

**1. Ársins veitsla (9.10)**
Gudstænasta, kapproður, kappríðing, fótbóltur, tingseta, dansur, tivoli og almennur veitslurómur eru tættirnir á ólavsøku í 1959.

**2. »Tjaldur« - Lívlínan til umheimin (8.26)**
Í 50 ár ríður Tjaldrið á aldunum millum Føroyar og Danmark.

**3. Løðið kanónina - Nebbafiskur í eygsjón (8.51)**
Á veiði eftir 70 tons stórum nebbafiski við hvalastingaranum Heyki á sumri 1949

**4. Føroyska himmiríki hermanna (9.52)**
Bretar hertaka Føroyar, men tann friðarliga hertøkan fær eisini avleiðingar, 1940-45.

**5. Aftur á slóðina (6.18)**
Frálíku upptøkurnar hjá Juliusi Høgnesen, apotekara, ið vitjar heimbygdina Oyndarfjørð í 1930.

**6. Frá træslupp til stáltrolara (9.04)**
Sluppfiskiskapurin kollveltir føroyska samfelagið og skapar nýggjar inntøkur og vælferð.

**7. Heimsins nalvi (7.58)**
Havnin veksur við vælferðini, og býurin broytist.

**8. Kongligt stórvask (12.00)**
Pyntan, stákan og veitslur eru á skránni, tá ið danska kongshúsið vitjar í 1907, 1921 og 1949.

**9. Síðsti kornakurin (5.44)**
Eina seinastu ferð verður kornið skorið, turkað, treskt, malið og bakað til drýlar í Húsavík í 1959.

**10. »Undirklæði, nei takk!« 3.11)**
Danskar og føroyskar modellir vísa fram nýmótans undirklæði á Hotel Føroyum í 1966.

**11. Við skipstroyggjuni í mastrini (9.11)**
Føroyska grindadrápið filmað gjøgnum 50 ár.

**Eykaágóði: Føroyar - Færøerne 10.38)**
Brot úr filmi eftir Jørgen Roos, ið lýsir lívið og týdningarmiklu fiskivinnuna í Føroyum, 1961.




# GÓÐAR SØGUR AFTAN FYRI ALLAR FILMSRULLUR

Seinasta átta mánaðirnir hevur filmsverkstaðið VideoPro í Skovlunde uttanfyri Keypmannahavn tugt seg ígjøgnum yvir 500 filmsrullur úr Føroyum, sum eru savnaðar saman í sambandi við verkætlanina Føroyskar Søgur.

Fyri dagliga leiðaran á VideoPro, Michael Vangsen, hevur uppgávan á ongan hátt kenst sum ein herskin biti við skerpikjøti at koma ígjøgnum.

– Eg skal ikki svara fyri mínar starvsfelagar, men eg eri hálvur føroyingur, og tí skil hevur uppgávan verið serlig hjá mær. Pápi mín, Ejgil Vangsen, flutti til Danmarkar sum 17 ára gamal, men sum smádrongur plagdi eg javnan at vera í Føroyum og vitja ommu. So fyri meg hevur arbeiði kenst sum ein ferð aftur á slóðina, greiðir Michael Vangsen frá.

VideoPro hevur verið virkið í sjey ár og brúkar Telecine film-skannarar, ið skanna sjálvan filmsstrimmilin – mynd fyri mynd. Hetta gevur eitt munandi betri úrslit samanborið við gamlar mátar at yvirspæla. Eitt nú verða uppruna litirnir varðveittir.

– Eg eri sjálvur bangin fyri, at ting skulu fara í gloymskunnarhav, og tað var orsøkin til, at eg fór undir hetta virksemi, staðfestir Christian Jensby, stjóri og eigari av VideoPro.

– Vit leggja nógvar orku og kenslur í hetta arbeiði, og tað er neyðugt, tí tað eru so nógvar kenslur knýttar at gomlu filmsrullunum, fólk lata okkum uppí hendi at yvirspæla fyri seg. Tað finnast góðar søgur aftanfyri flest allar tær filmsrullur, ið fara ígjøgnum okkara skannarar, og tí skil er tað sera gevandi fyri okkum at viðvirkandi til, at hesar søgur fáa møguleika at verða varðveittar fyri eftirtíðina, útgreinar Christian Jensby.

*Uni L. Hansen*



**FAKTA**
VideoPro
Literbuen 12 B
2740 Skovlunde
Telefon: +45 44929094
T-postur: info@smalfilm.dk
Heimasíða: www.smalfilm.dk